

## Tíðin farin frá fyrstu døgum

Á borgarafundinum í Nólsoy mikukvøldið varð tosað um eitt nú ferðaætlanina hjá Rituni og hjá møguligum øðrum skipi á farleiðini. Ført varð fram av fundarfólkinum, at tíðin var farin frá at skipini ikki sigldu fyrsta páskadag, fyrsta hvítusunnudag, nýggjársdag og so framvegis. Víst varð á, at hjá fólki, sum eru bundin allar vanligar gerandisdagar og leygardag eisini, eru slíkir dagar nærum einasti møguleiki at vitja á øðrum oyggjum. Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni, metti, at hetta so líðandi fór at koma inn í ferðaætlanina, og at skipini hjá Strandferðsluni fóru at sigla hesar fyrstu dagarnar. Tó vildi hann ikki lova, at hetta eisini fór at verða galdandi fyri fyrsta jóladag. Eisini vildi fólk vita, hví tað ikki ber til at gjalda við gjaldskorti umborð á Rituni. Hesum visti strandferðslstjórin ikki av, og tað skiltist á lagnum, at hann fór at taka stig til, at hetta frameftir fer at lata seg gera.

# Ternan frægasta og einasta alternativ

**Á borgarafundi í Nólsoy mikukvøldið greiddi Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni, frá støðuni við nýggjari nólsoyarferju. Sum støðan er í løtuni, er Ternan helst frægasta og einasta loysnin**

BORGARAFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Lagt var upp til konstruktivt kjak um farleiðina Tórshavn-Nólsoy á borgarafundinum í skúlanum í Nólsoy mikukvøldið. Ætlanin var, at bæði Strandferðslustjórin, Bogi Mortensen, og landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Jóhan Dahl, skuldu verða við á fundinum, men landsstýrismaðurin var á útferð við starvsfólki úr Vinnumálaráðnum hetta kvøldið, og tí møtti bert Strandferðslustjórin.

Tað fekst tí eingin politisk útmelding á fundinum, men kjakið gjørdist kortini áhugavert og konstruktivt.

Bogi Mortensen greiddi frá, at Strandferðslan hevur gjørt ymsar royndir í vár við at seta ymisk skip inn á ymsar farleiðir fyri at fáa eina mynd av, hvussu hetta royndist.

Másin varð tikin úr sigling á svínoyar- og fugloyarleiðini og Ritan sett inn í staðin. Samstundis varð Sam tikin úr kallsoyarsiglingini og settur á nólsoyarleiðina, meðan Ternan røkti rutuna út í Kallsoynna.

Hóast Sam á ongan hátt nøktar neyðuga tørvin á nólsoyarleiðini so vísti royndin, at nólsoyingar eru sera áhugaðir í einari loysn, sum ger tað møguligt at flyta bilar um fjørðin.

Soleiðis vóru einir 20 bilar í Nólsoy um páskirnar, og hóast tað ikki stóðst tann stóra koyringin av hesum har úti, so vóru tað ógvuliga nógvir nólsoyingar, sum vóru fegnir um hendan møguleikan.



Bogi Mortensen greiddi frá møguleikunum fyri ferjusambandi millum Tórshavn og Nólsoy.

Mynd: Áki Bertholdsen

### Besta loysnin

Fyri tveimum árum síðani vóru umboð fyri landsstýrið og strandferðsluna í Nólsoy saman við umboðum frá kommununi, og tá varð løgd fram ein ætlan um nýtt skip til nólsoyarfarleiðina.

Síðani hetta er eitt løgtingsval farið fram, nýggj samgonga kom til undan núverandi samgongu, men samstundis hevur ein altjóða fíggjarkreppa gjørt um seg, og fyritreytirnar eru munandi broyttar.

Skipið, sum talan var um at byggja, var skræddaraseymað til farleiðina um Nólsyarfjørð. Byggitíðin til hetta skipið er mett til hálvtannað til tvey ár, og kostnaðarmetingin liggur millum 40 og 50 milliónir krónur. Men sum tíðirnar eru nú, eru eingir pengar til at byggja slíkt skip fyri.

Hinvegin hevur Strandferðslan nú gjørt sær sínar tankar um, hvat so er til ráða at taka.

Bogi Mortensen greiddi frá, at settar eru 3,5 milliónir av til eitt skip á svínoyar- og fugloyarleiðini, men tað sigur seg sjálvt, at tað verður ógjørligt at fáa eitt nýtt – ella fyri tann saks skuld gamalt – skip fyri so lítlan pening.

Strandferðslan hevur tí sent Vinnumálaráðnum eitt uppskot um at nútímansgera Ternuna, so hon líkur øll neyðug krøv, og síðani at seta hana inn í nólsoyarsiglingina.

Barlast tangar og slengrikjølar skulu setast í skipið, ein lyfta skal somuleiðis byggjast, umframt umvælingar í salong og á sanitera økinum. Í alt verður roknað við, at ein slík umbygging og modernisering av Ternuni fer at kosta 8,5 milliónir.

Samstundis skulu ábøtur gerast umborð á Rituni fyri 900.000 krónur, so samlaði kostnaðurin fyribæði skipini verður mettur til 9,4 milliónir krónur.

### Mangla fýra milliónir

Stjórin á Strandfaraskipum Landsins upplýsti, at verða tær 3,5 milliónirnar fluttar frá norðoyggjaskipi til hesar umvælingarnar, og megnar Strandferðslan sjálv at finna tvær milliónir krónur, so sum stjórin roknar við, koma tað at mangla fýra milliónir krónur í at fáa verkætlanina at hanga saman.

Hesar fýra milliónirnar verður so neyðugt hjá fíggjarnevndini at játta til Strandferðsluna sum eina eykajáttan.

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havnar kommunu, gjørdi greitt, at kommunan ikki fór at hjálpa til fíggjarliga fyri at fáa loyst hendan trupulleikan, men hann lovaði hinvegin, at teir skuldu arbeiða tætt saman við Strandferðsluni at fáa gjøgnumført hesa loysnina.

- Kunnu vit verða við til at trýsta landsmyndugleikarnar og á tann hátt verða við til at gera okkara ávirkan galdandi, so vilja vit sjálvandi fegnir gera tað, segði Heðin Mortensen.

Men uttan mun til, hvør loysnin verður, so verður neyðugt at byggja okkurt slag av einari ferjulegu í Nólsoy. Henda er ikki við í útrokningunum hjá Strandferðsluni, og sambært býtinum millum land og kommunur, er hetta ein landsuppgáva.

Annars var tað áhugavert, at eingin av fundarluttakarunum hevði nakað ímóti, at Ternan verður (fyribils)-loysnin á nólsoyarleiðini, hóast nólsoyingar eru fullgreiðir um, at tað fer at kosta nakrar avlýsingar á vetrardegi.



*Einir 20 bilar vóru fluttir um nólsoyarfjørð meðan Sam røkti rutuna fyri Rituna um páskirnar*

Myndi: Leo Poulsen